Leiðreglur hjá AMEG fyri íløgur í Føroyum

Almennar reglur galdandi fyri allar aktivklassar:

Væntaða avkastið má svara til váðan av íløguni.

Virðisbrævaíløgur skulu kunna seljast til eina og hvørja tíð. Alternativar íløgur skulu sannlíkt kunna seljast eftir rímiligt áramál um neyðugt.

Ikki ber til at seta meira enn 5% av fænum av í eina einstaka íløgu, tó bert 2% í einstøk partabrøv.

Reglur galdandi fyri einstøku aktivklassarnar

Fíggjareftirlitið býtir aktiv upp í ymiskar klassar, sum AMEG hevur valt at fylgja

1.Grundøki og bygningar (0-10%)

Tað skal vera sannlíkt, at tað ber til at selja íløguna eftir hóskandi áramál, til ein minsta prís, sum svarar til diskonteraða cash-flowið av íløguni.

2.Kapitalpartar (Partabrøv) (0-40%)

AMEG ger ikki íløgur í einstøk føroysk partabrøv. Hinvegin, ber til at gera íløgur í íløgufelag við føroyskum partabrøvum. Tað skal vera sannlíkt, at AMEG kann selja íløguna eftir eitt hóskandi áramál.

Umsitingin hjá AMEG hevur ikki orku til at málsviðgera avgerðir um útveljing av einstøkum feløgum, hvørki útlendskum ella føroyskum.

3.Lánsbrøv (0-100%)

AMEG kann gera íløgur í lánsbrøv, eisini í føroysk lánsbrøv. Vanligt er, at íløgurøktararnir keypa landskassalánsbrøv. Men AMEG kann eisini gera íløgu í lánsbrøv, sum útlendsk feløg selja í sambandi við lán til íløgur í Føroyum, tó treytað av hóskandi avkasti og váða.

4.Lán við trygd í fastari ogn (0-15%)

Henda heimild er gjørd til at AMEG skuldi kunna veita lán til Eysturoyar og Sandoyartunlarnar, og kann nýtast til líknandi verkætlanir í framtíðini, og til lán til íbúðarverkætlanir ella vinnuliga bygging.

5.Alternativar íløgur (0-20%)

AMEG kann gera alternativar íløgur, sum hava avkast sum svarar til váðan, tó bert til íløgur, sum hava lágan ella miðal váða.

AMEG kann ikki gera íløgur har vøru- og framleiðslutøknin ikki er liðugt ment.

Íløgan skal sannlíkt kunna seljast eftir ávíst áramal. Tað skal vera sannlíkt at íløgan kann seljast fyri ein minsta prís sum liggur á leið á diskonteraða cash-flowinum av íløguni. Íløgur, sum geva vinningsbýti hava fyrimun.

Samfelagsnytta, kapping og grønt orkuskifti: Umframt omanfyri nevndu atlit eigur viðgerðin av alternativum íløgum at taka positivt atlit til íløgur, sum metast:

1. at hava eitt positivt íkast til samfelagsbúskapin

2. geva eitt íkast til grøna orkuskiftið

AMEG kemur ikki at gera beinleiðis íløgur í alternativ, men vera fíggjarligur íleggjari.

6.Onnur fíggjarlig aktiv (0-10%)

Lán til almennar myndugleikar og grunnar

AMEG kann veita lán til føroyskar almennar myndugleikar, íroknað almennar grunnar, við høgum kreditvirðið.

Argir 1. mai 2025